TING-HELLAN

# ES Fólkaatkvøða í Danmar

TINGHELLUANALYSA
*Bogi Eliasen*
*cand.scient.pol*



Vit hava vitað av, at áður enn alt ov rúma tíð skulu danir atkvøða um ES grundlógina, tvs. um ES grundlógin skal setast í gildi fyri Danmark. Og hvat so? Vit vita jú, at hon ikki skal hava virkni fyri Føroyar. Men vit eru framvegis partur av danska ríkinum, og tí ávirkar tað okkum. Semja er tó ikki um í hvussu stóran mun og hvat hetta fer at broyta.

Í nógv ár uttan veruligt kjak um ES, um bæði møguleikar og vansar, var tað at fegnast um at vit júst hava havt fólkatingsval við hesum, sum eitt av høvuðsevnunum í valstríðnum í Føroyum.

## Hvat broytir traktatin fyri ES?

Grundlógin broytir, at fleiri málsøkir verða løgd undir yvirstatsliga partin hjá ES og eftir kvalifiseraðum meiriluta-avgerðum. Tað merkir, at londini ikki hava sýtingarrætt, og at avgerðirnar eru bindandi fyri limalondini. Soleiðis verður ES meira samansjóðað, tí fleiri málsøkir fara at vera undir felags ábyrgd. Í dag er ein partur av ES samstarvinum millumtjóða, og eftir ES grundlógini er ætlanin, at alt samstarvið verður yvirstatsligt. Men hon merkir eisini, at sonevnda Kommissiónin fær minni vald, at ES tingið og tingini hjá limalondunum fáa størri ávirkan, ella í hvussu so er møguleika at hava størri ávirkan. Eisini setir ES grundlógin út í kortið, at ein felags ES Uttanríkismálaráðharri skal vera, og er hetta ein leistur til at gera ein sterkari felags uttanríkispolitik. Hetta fer eisini at umfata Danmark, og vit eru partur av danska uttanríkispolitikkinum

## Hvat broytir hon fyri Føroyar?

Sjálv grundlógin broytir ikki beinleiðis føroysk viðurskifti, tí hon fær jú ikki gildi fyri Føroyar. Men tað er tó ikki so einfalt allíkavæl. Tað kemst av, at vit eru ein partur av danska ríkinum og hava ikki ræði á øllum málsøkjum. Men økir, Føroyar ikki hava yvirtikið og har ES samstarvar millumtjóða ella yvirtjóða, fara at vera undir ES ávirkan. Sigast kann at hetta ikki er nøkur broyting í mun til í dag, og tað er helst nakað um tað. Men niðurstøðan er so ein staðfesting av, at økini eru undir ES ávirkan longu í dag. T.d. hevur Fogh Rasmussen í einum fólkatingssvari víst á, at avtøkan av teim fýra fyrivarninum ikki fær stóru ávirkanina á Føroyar, tí økini eru longu í dag undir ES ávirkan.

## Grundlógin, og so fyrivarnini?

Í eini langtíðar politiskari meting er tað ov stuttskygt bert at hugsa um grundlógina. Um tikið verður undir við ES grundlógini, er væntandi at somu fólk taka undir við at taka donsku fyrivarnini av. Kjarnin í ES grundlógini er léttari og greiðari samstarv, og at fleiri málsøkir verða stýrd við kvalifiseraðum meiriluta. Tí má roknast við, at um ES grundlógin verður góðtikin av danska veljaraskaranum, so fella fyrivarnini skjótt.

Fella fyrivarnini og einki verður broytt í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark, merkir tað at fleiri av teimum málsøkjum, sum í dag verða mett sum ríkismál, koma undir ES vald og tí undir beinleiðis ES ávirkan, sjálvt um vit standa uttanfyri. Tí er neyðugt at koma fram til eina loysn viðvíkjandi Føroyum, um so er at Danmark tekur fyrivarnini av.





*Í eini roynd at fáa neyðuga orðaskiftið ígongd, hevur Anders Fogh Rasmussen í góðari tíð boðað frá, nær danska fólkaatkvøðan skal haldast*

Í Danmark hevur seinastu dagarnar verið roknað við at fólkaatkvøðan skuldi verða í september. Mett verður at hetta er so, bæði tí at stjórnin vann ein greiðan sigur á Fókatingsvalinum og tí at um meiriluti er fyri ES grundlógini, kann henda stjórnin í hesum valskeiðnum eisini taka fyrivarnini upp og møguliga til atkvøðugreiðslu. Serliga vil stjórnin av við fyrivarnini í hernaðar- og rættarsamstarvi, sum í verandi líki seta Danmark uttanfyri á hesum týdningarmiklu økjum. Hinvegin ber helst til at liva við ikki at vera partur av felags ríkisborgarararætti og gjaldoyrasamstarvi.

## Danmark úr ES?

Danmark hevur fingið orð á seg, sum eitt land sum er ivingarsamt mótvegis ES. Hugsað verður serliga um Mastrichavtaluna sum fall, og síðan tey fýra fyrivarnini sum komu burturúr. Eftir teimum var ætlanin, at byrja við at taka fyrivarnini av, tá fólkaatkvøða var um gjaldoyra, men hetta fall tí meiriluti ikki var fyri. Um so var, at meiriluti hevði verið fyri gjaldoyranum, høvdu hini fyrivarnini helst eisini komið fyri fólksins dómstól sum fólkaatkvøða.

Danski forsætismálaráðharrin Anders Fogh Rasmussen hevur í vikuni sagt, ella hótt við at avleiðingin av ikki at taka undir við ES grundlógini er, at Danmark helst má taka seg heilt burturúr evropeiska samstarvinum. Men, sum ES mótstøðan vísur á, er hetta at kalla eitt søguligt argument hjá ES fjepparunum, sum tó ikki vísir seg vera satt, tá fólkið ikki tekur undir við ES leistinum.

## Fleiri fólkaatkvøður?

Fólkaatkvøðan um ES grundlógina skal tí metast sum fyrsta av fleiri, eftir tí ætlan sum ES